LONDON EYGA

Á Thames áarbakkanum í London stendur eitt ovurstórt parisarhjól kallað London eyga.
Sí mynd og strikumynd niðanfyri.



Parisarhjólið hevur ein ytri diametur upp á 140 metrar, og hægsta punktið á tí er 150 metrar yvir Thames ánni. Pílarnir vísa hvønn veg tað melur.

Spurningur 1: LONDON EYGA

PM934Q01 – 0 1 9

Bókstavurin *M* á tekningini vísir miðjuna á hjólinum.

Hvussu nógvar metrar (m) er punktið *M* omanfyri Thames ánna?

Svar: ..... m

Spurningur 2: LONDON EYGA

PM934Q02

Parisarhjólið melur við javnari ferð. Hjólið brúkar 40 minuttir neyvt um at mala eitt umfar.

John byrjar túrin í parisarhjólinum á pallinum við punktið *P*.

Hvar verður John staddur eftir hálvan tíma?

A í *R*
B Millum *R* og *S*
C Í *S*
D Millum *S* og *P*